## VIÐMERKINGAR

# Suðuroyarætlanin

**Jacob Vestergaard**



VAL05

Landsstýrið er nú komið við einari ”Suðuroyarætlan” í 10 punktum, sum skal stuðla undir menningina av Suðuroynni. Fleiri av punktunum eru staðfestingar av betringum, sum longu eru framdar ella settar á dagskrá, og sum vónandi viðvirka til, at gongd kemur á aftur virksemi í Suðuroynni.

Landsstýrið nevndir møguleikan, at Suðuroyggin verður ein ”feskfiskamiðdepil”. Hetta er sera áhugavert, men samstundis fegnast landsstýrið um, at 35-40 ársverk verða á Polarfrost í Vági. Tað er tó trupult at íminda sær, at Suðuroyggin skal verða ”feskfiskamiðdepil”, tá størsta virki í Suðuroynni, Polarfrost, verður nýtt til saltfiskaframleiðslu, men livst og spyrst.

Hóast frammanfyristandandi, og hóast ein kundi hugsa meira ítøkiligar útmeldingar frá landsstýrinum, so er tað at fegnast um, at ein ”Suðuroyarætlan” er gjørd. Politiski myndugleikin tekur støðuna í Suðuroynni í álvara og viðgerð hana á hægsta stigið.

Sum íkast til ”Suðuroyarætlanina” kundi eg hugsað mær útmeldingar um, at dagført alt vegakervið í Suðuroynni, og ikki bert farleiðina millum Hov og Øravík. Hyggja vit at farleiðini til Hvalbiar, so er Hvalbiarbergholið ótíðarhóskandi og er ein forðan fyri tí virksemi, sum er í Hvalba. Nýtt berghol millum Trongisvág og Hvalba er ein sera týðandi táttur í framtíðini hjá Suðuroynni, og má raðfestast skjótast, eins og bergholið ”norður um fjall” á Borðoynni.

Sum tað framgongur av ”Suðuroyarætlanini”, skulu íløgur gerast í Suðuroynni fyri uml. 200 mill. kr. Hetta eru ætlanir, sum undanfarna samgonga raðfesti og setti gongd á. Skal hendan samgongan veruliga seta nakað í verk, sum bæði uppá longuri og stytri sikt er gagnligt fyri Suðuroynna, eigur nýtt Hvalbiarberghol at setast á dagskránna. Ein endurreisn av vinnulívinum í Suðuroynni kann ikki verða virkseminum í Hvalba fyriuttan.

Verður eitt ”Hvalbiarberghol” boðið út í totalenterprisu samstundis sum nevndu byggiarbeiðir, verður kostnaðurin fyri arbeiði munandi minni enn um verkætlanin stendur einsamøll. Hetta hevði uppá stutt sigt givið tiltrongd arbeiðspláss í byggivinnuni, og uppá longuri sikt verið ein sera gagnlig íløga, eisini havandi í huga tosið um kommunusamanlegging. Alt kann sjálvtsagt ikki gerast samstundis, tí íløgur skulu gerast kring alt landið, men nýtt Hvalbiarberghol má raðfestast og fyrireikast. Tí eigur tað at nevnast í ”Suðuroyarætlanini”.

Hugskotið um ein ”Suðuroyargrunn” sæst ikki aftur í ”Suðuroyarætlanini”. Ein ”Suðuroyargrunnur” hevði verið eitt hent amboð til at fingið gongd á aftur vinnulívið í Suðuroynni.

Eitt hugskot til at stovnað ein ”Suðuroyargrunn” hevði verið, at landið lat fiskavirkini sum Framtaksgrunnurin eigur í Vági og á Tvøroyri sum stovnsfæ í grunnin. Framtaksgrunnurin skal gjalda landskassanum lán aftur. Ein partur av hesum afturgjaldið kundi verið virkini í Vági og á Tvøroyri, sum landið so kundi nýtt til at stovnsett ”Suðuroyargrunnin” við.

Ein slík ætlan hevði verið ítøkilig og eggja framtakshugaðum vinnulívsmonnum, fíggingarstovnum o.ø. til at verið partur av ”Suðuroyargrunninum”, og harvið vinnilívinum í Suðuroynni. Á tann hátt kundi ætlanin um at gera Suðuroynna til ein ”feskfiskamiðdepil”, m.a. við feskum upsavørum, verið sett í verk, til gagns fyri alt landið.

Vit hava, sum eg áður havi nevnt, sjálvi møguleikan at venda gongdini. Tað er upp til okkum, kommunurnar og vinnulívið, at útfylla okkara part av ”Suðuroyarætlanini”. Vit mugu veruliga taka okkum saman, so vit, saman við landsstýrinum, fáa vent gongdini í Suðuroynni.

# Virknari leiklut á altjóða pallinum

**Johan Dahl**
*løgtingsmaður*
*Valevni til fólkatingið fyri Sambandsflokkin*



VAL05

Okkara umboðan á Fólkatingi skal nýtast sum ein platformur til at menna okkara samfelag bæði:

- Vinnuliga - við at knýta sambond við onnur lond.
- Í útflutningshøpi - við at vera við í átøkum saman við dønum og grønlendingum, har føroysk umboðan ikki er annars.
- Í granskingarhøpi - saman við dønum og øðrum ES londum í átøkum, sum veruliga kunnu geva okkum nýggjar vinnur - eisini her heima.
- Mentanarliga - við at lata hurðar upp fyri okkara mongu ungu evnaríku tónleikarum, sangskrivarum, listafólki og rithøvundum, so pallurin hjá teimum úti í heimi eisini verður størri at virka á.
- Í útbúgvingarhøpi - við áhaldandi at viðvirka til at føroyskur ungdómur fær bestu útbúgvingarnar í Evropa og kring allan heim.
- Í menningar og neyðhjálpar átøkum - við at hjálpa umvegis tey kervi, sum danir hava, og harvið gera okkum sjónligari í altjóða høpi.
- Virka fyri at fáa allar vinnuligar marknaðarforðingar við ES burtur í tøttum samstarvið við danskar ES parlamentarikarar.

**Út á ríkisins sendistovur at virka fyri Føroyar**

Føroyingar skulu aftur í komandi árum, í nógv størri mun enn undanfarin ár, virka vegna Føroyar á sendistovum ríkisins kring í heiminum, eins og í tíðini tá Hans Andrias Djurhuus, sáli, var sera virkin og var við til at fáa ungar føroyingar út í heimin sum assistentar/trainees á donskum sendistovum kring allan heimin til stóra menning fyri hesi fólk og til gagn fyri føroyingar og føroysk vinnulív.

Hesi fólk skulu vera við til at stuðla og veita kunnleika um nýggjar marknaðarmøguleikar, okkara vinnulívið at gagni, og vera við til at kunna um Føroyar um tað, sum vit hava at bjóða útlendingum, ið ætla sær hendan vegin.

Eitt aktivt Sambandsumboð at umboða Føroyar á fólkatingið er neyðugt. Eitt Sambandsumboð, sum vil virka fyri tøttum, gevandi samstarvi millum ríkispartarnar er umráðandi.

Farið tí á val - ung sum eldri - og veljið eitt Sambandsumboð á Christiansborg, - tað angrar tú ikki.

Gott val.

# Brent barn ræðist eld

**Katrin Dahl Jakobsen**
*Javnaðarflokkurin*



VAL05

Javnaðarflokkurin hevur altíð sæð fólkatingssessin sum sína demokratisku skyldu til at virka positivt fyri føroyskum áhugamálum. Áhugamál, sum eru til gagns fyri føroyingin. Í hesum liggur, at vit altíð virka út frá teirri støðu vit til eini hvørja tíð eru í, heldur enn at søpla burtur tíð og peningaligan fólkatingsstuðul at læsa okkum fastan í konservativan sambands/ loysingar retorik.

Slíkt signalerar bert føroyska ósemju og máttloysi. Vit mugu úr stillstøðuni og koma okkum framá!!

**Standa saman**

At tað við áhaldandi upplýsandi og semjusøkjandi arbeiði ber til at náa málum, hava javnaðarumboð umvegis fólkatingssessin og í samskifti við danir prógvað ferð eftir ferð. Soleiðis bar tað slóðbrótaranum Petur Mohr Dam til í 1963 at sannføra norðurlandaráðslimir um, hvussu rímiligt tað var, at Føroyar eisini fingu umboðan í hesum stóra ráð, og fekk hann eisini Merkið at veittra á fyrsta sinni undir liðini á hinum norðurlendsku fløggunum. Men sum ikki einaferð, so dálkaðu afturhaldskreftir málið, tá tað kom til atkvøðugreiðslu á Løgtingi 1.okt. 1969. Javnaðar-, Sambands- og Sjálvsstýrisflokkurin atkvøddu fyri, Tjóðveldið atkvøddi ímóti og Fólkaflokkurin atkvøddi ikki. Løgið, at ikki full semja var um hetta!!! Tó trettan ár eftir at P.M. Dam tók málið upp á fyrsta sinni, var Erlendur Patursson farin at halda, at rættast var, at vit fingu sjálvstøðuga umboðan. Hana hava vit ikki fingið enn. Men nú hesir báðir flokkar, sum á sinni vóru ímóti, eisini eru vorðnir góðir við málið, ja so hava vit eina felags støðu. Og tað er nú ikki so galið!!!

Fólkapensjónin, undirgrundin og krígspensjónin eru onnur dømi um, hvussu væl javnaðarumboðini hava dugað politikk. Tað eru úrslit sum telja og ikki, hvussu nógvir spurningar ella røður hvør hevur hildið.

**Trúfesti mótvegis okkara landsmonnum**

Tað er nógv sum bendir á, at hetta góða politiska hegni, sum Javnaðarflokkurin hevur víst á Fólkatingi, aftur fer at fáa ta rúmd, sum tað hevur uppiborið. Við yvirtøkulógini og stjórnarlógini føroyska vit sjálvsstýrismálið, og við tí sleppa vit undan tí kegli og skammiliga orðadrátti á Fólkatingi, sum vit hava sæð í seinastuni. Tað verður og hevur alla tíðina verið skeiv adressa!!!

Føroyska tjóðin hevur brent seg so dyggiliga av tí. At nakað føroyskt fólkatingsumboð skal bera so í bandi, at orsaka av sínum egnu skeivu upplýsingum, so verður ein heil statt av okkara egnu landsmonnum drigin ígjøgnum donsku manegina. Hugsi um sjómenninar og TV 2 málið. Heldur eiga vit støðugt at leita upp møguleikar til bata, fleiri avbjóðingar og lata upp dyr út í heim. Vit skulu alla tíðina byggja upp og virka fyri endurnýggjan í hesum ríkisfelagsskapinum, sum hóast alt er ein politiskur veruleiki.

Lesið Sosialin - so eru tit við